## DAGSINS MEINING

# Kappingarføri og flutningur

Tað var ein sera áhugaverd grein her í blaðnum í gjár, har ein fiskaútflytari ger vart við teir sera álvarsomu flutingstrupulleikarnar hjá út flutningsvinnuni. Viðkomandi útflytari, sigur, at tað eru tær fesku vørurnar, sum skapa dynamikk í prísinum. Hann leggur afturarat, at "tann dynamikkin hava vit ikki við teimum flutningsøguleikum, sum nú eru". Útflytarin, Leif Høj, vísir á, at tað, sum hevur eina størstan týdningin fyri kappingarførið, er, at vit fáa betri flutningsmøguleikar ímillum Føroyar og umheimin.

Útflytarin upplýsir, at fiskur, sum verður avskipaður í Føroyum mánadag, er ikki frammi á marknaðinum fyrr enn hósdag. Fiskur, sum verður avskipaður hósdag, er ikki frammi, fyrrenn mánadag, og fiskur, sum verður avreiddur týsdag, verður ikki frammi fyrrenn mánadagin. Á nógvum marknaðum kunnu føroyskir útflytarar sostatt bara lata vørur eina ferð um vikuna. Hetta er er eisini galdandi fyri okkara høvuðsmarknað fyri upsa og kongafisk, sum er tann týski marknaðurin. Tað er innlýsandi, at so vánaligar karmar kunnu vit ikki framhaldandi bjóða okkara høvuðsvinnu.

Tann, sum lesur nevndu grein, má spyrja, hví skilið er, sum tað er. Hetta er, sum nevndi útflytari sjálvur sigur: "burtur úr vón og viti og er ein stórur bági fyri kappingarførið". Hann leggur afturat, at bóru føroyingar seg rætt at, kundi avreiðingarprísurin á fiski verið munandi hægri, enn hann er nú. Leif Høj hevur eisini nøkur onnur áhugaverd sjónarmið uppá kappingarføri og tímalønir, sum vit venda aftur til í eini komandi oddagrein. Her skulu vit bert loyva okkum at vísa á, at hetta skilið við sera vánaligum flutnings-møguleikum kann ikki halda fram. Tað er hóskandi at minna á, at tann flokkur, sum nú hevur leiðsluna í landsstýrinum lovaði vinnuni nógv betri karmar og rúmari virkisræsur. Hetta sæst aftur í samgonguskjalinum við. Her má tí vend koma í. Flutningstrupulleikarnir hjá útflutingsvinnuni er eitt politiskt mál og eigur at verða loyst sum eitt politiskt mál – og hetta mál hevur skund.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Regatta 2004

TÍÐINDASKRIV
*frá Hósvíkar Róðrarfelag*



Árliga regattasiglingin Eiði – Hósvík - Nólsoy fyriskipað av Hósvíkar róðrarfelag verður vikuskiftið 6. og 7. August. Siglt verður av Eiði, fríggjakvøldið 06. aug kl. 19:00, til Hósvíkar.

Tá komið verður til Hósvíkar, eru allir luttakararnir bodnir til ein døgverða í bygdarhúsinum. Í Hósvík verður møguleiki hjá luttakarum at seta tjald upp.

Regatta dansur við LM band verður í bygdarhúsinum.

Leygarmorgunin eru allir luttakararnir bodnir til morgunmat í bygdarhúsinum.

Seinnapartin Leygardagin verður farið til Nólsoyar eftir sama framferðarhátti sum av Eiði.

Tilmelding skal fara fram á www.hosvik.fo ella hjá einum av nevndarlimunum í róðrarfelagnum.
Hans Jacob 422086 / 210186
Elinborg 422922 / 722922

Til ber eisini at fara á www.krf.fo ella www.drekin.fo og trýsta á link til regatta 2004

Seinasta freist at melda til er mikukvøldið 4. aug. klokkan 22:00

Kostnaður 100 kr. Fyri hvønn luttakara. Íroknað kostnaðin er døgverði og morgunmatur í bygdarhúsinum. Goldið verður kontant á bryggjuni á Eiði.

Undanfarin ár hevur tað verið eitt sindur torført at fingið luttakandi bátar at fylgt teimum boðum ið givin hava verið. Tí hava vit í ár fingið fýra skjóttgangandi bátar við frá bjargingarfeløgunum og verða bátar bidnir um at fylgja boðum frá hesum. so øll kunna fáa eina góða og hugnaliga regatta.

Stuðlað tiltakinum hava: Bátatænastan - Føroya Sparikassi – Krás - Reno Vent - Artic Importø

# Útisetatelefonbókin komin

TÍÐINDASKRIV

Útisetatelefonbókin fyri árið 2004 er komin í føroysku bókabúðirnar. Útisetatelefonbókin er ein telefonbók yvir føroyingar búsitandi uttanlands.

Bókin er í støddini eitt sindur minni enn A4. Umframt mongu litføgru lýsingarnar, eru nærum 3000 felagar skrásettir í bókini. Upplagið er 3500 eintøk.

Í Danmark kom Útisetatelefonbókin út í februar mánað, men av tí at gravgangurin eftir bókini hesuferð var so mikið stórur, varð neyðugt at prenta 500 eintøk eyka. Tí kemur hon fyrst nú út í Føroyum.

Tað er reklamufyritøkan Mediagraph, ið gevur út Útisetatelefonbókina. Átta fólk eru í starvi á fyritøkuni, harav ein føroyingur er í føstum starvi umframt tveir aðrar føroyingar, sum eru knýttir at reklamustovuni sum freelance.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Punktgjøld – frá luksusvøru til luksusburturkast

**Viðmerking frá IRF**



Almenn punktgjøld á nýtsluvørum kunnu hava ymisk endamál til ymsar tíðir. Tey kunnu brúkast til at tálma nýtslu, at broyta nýtslumynstur og til stuðla umhvørvisátøkum.

Fyri eini fimmti árum síðani var kolkomfýrur í køkinum ikki nøkur luksusvøra, men í sekstiárunum blivu petroliumfýringar setar í nógvar av teimum, og tað var stás. Seinni vórðu teir avloystir av miðstaðarhitaketlum, og tað var tað reina luksus. Í fimtiárunum fingu flestu føroyingar eisini elektrisitet og luksusvøran elektriskur komfýrur við bakarovni varð at síggja í alt fleiri húsum í fimmti og sekstiárunum.

Síðani eru nógv fleiri luksuvørur komnar, samstundis sum fyrrverandi luksusvørur eru vorðnar hvørs mans (m/k) ogn. Køliskáp og frystiboksir, vaskimaskinur og uppvaskimaskinur, dustsúgvarar og eymhettur, radio, sterioanlegg og surroundskipanir, sjónvarpsskipanir og telduskipanir, telefonir og fartelefonir. Allir hesir hentleikar eru nú í so at siga hvørjum húsi. Harafturat koma persón-bilar og glastrevjabátar.

Felags fyri allar hesar lutir er, at teir eldast og antin fara av móta ella ganga fyri. Teir verða skiftir út og koyrdir burtur.

Fyri fáum árum síðani vórðu allir hesir lutir grivnir niður á ymsum tyrvingarplássum kring landið. Lítið varð hugsað um tungmetalir, POP og ozonskaðilig evni. Hetta er broytt og verður tíbetur ikki gjørt longur. Men tað er eisini ein hóp dýrari at beina hesar lutir burtur í dag.

**Skiljing og burturbeining**
Í IRF-skipanini verður í løtuni mælt til at skilja hetta burturkastið soleiðis:

Jarn og metal
- eymhettur
- hitaketlar
- komfýrar
- uppvaskimaskinur
- vaskimaskinur

CFC-vørur (freon-vørur)
- køliskáp
- frystiboksir

Elektriskt og elektroniskt burturkast (WEEE)
- borimaskinur
- dustsúgvarar
- fartelefonir
- radio
- sendarar
- sterioanlegg
- surroundskipanir
- sjónvarpsskipanir
- telduskipanir
- telefonir
- v.m.

Bilar
- bussar
- lastbilar
- persónbilar

Alt vanligt jarn og metal í IRF - limakommunununum verður savnað saman á nøkrum fáum støðum og flutt til Kommunalu Brennistøðina hjá Tórshavnar kommunu, har tað verður kroyst saman, og síðani sent av landinum til endurnýtslu. Persónbilar verða eisini kroystir á sama stað, men framman--undan skal øll olja og ymisk útgerð verða tikin úr bilvrakinum.

Freonvørur og elektroniskt burturkast verða send til góðkent móttøkuvirki uttanlands, sum antin viðgera tilfarið sjálvi ella senda lutirnar til virki, sum hava serkønan kunnleika til at taka hesar lutir sundur og viðgera teir einstøku smálutirnar.

Burturkastið verður viðgjørt soleiðis, lutvíst fyri at minka um dálking frá serligum evnum, t.d. freon og tungmetalum, men eisini fyri at endurnýta lutir og endurvinna metalir.

Nógv orka verður brúkt til flutning av hesum burturkastinum. Fyri køli- og frystiburturkast og elektronikk burturkast skal eisini gjaldast fyri viðgerðina á seinasta staðnum.

**Fígging**
Elektriskt og elektroniskt burturkast, CFC-burturkast, bildekk og tílíkt hevur verið viðgjørt í serligum skipanum í okkara skandinavisku grannalondum í fleiri ár. Sokallaði grøn avgjøld, ella kanska betur burturkastgjøld, hava verið løgd á summar vørur. Virki, sum kunnu prógva, at burturkastið er endurnýtt, endurvunnið ella fyribeint á annan góðkendan hátt, fáa goldið eitt fast gjald fyri hvørja eind tey hava avgreitt.

ES hevur eisini viðgjørt hesar burturkastbólkar eina tíð og samtykt eitt direktiv fyri elektriskt og elektroniskt burturkast (WEEE-direktivið). Direktivið gevur framleiðarum, umboðum og handlum eisini ábyrgd av tólunum, eftir at tey ikki verða brúkt meira (framleiðaraábyrgd). Roknað verður við, at WEEE-direktivið fer at økja serinnsavningina og serviðgerðina av elektriskum og elektroniskum burturkasti. Roknað verður eisini við, at hetta fer at broyta tólini viðvíkjandi viðlíkahaldi, endurnýtslu, sundurtøku og endurvinning. WEEE-direktivið verður sett í gildið í Danmark í august í ár.

Í Svøríki hevur ein líknandi skipan verið í gildið síðani 2001.

Skipanin merkir millum annað, at hvørja ferð ein kundi keypir eina elektriska ella elektroniska vøru, kann hann lata handlinum eina tilsvarandi nøgd av brúktum tólum.

Nú Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at flestu av verandi punktgjøldum á omanfyrnevndu vørum skulu minkast ella takast av, verður heitt á Fíggjarmálaráðið saman við Innlendismálaráðnum, at meta um møguleikan at halda ein part av gjøldunum eftir, soleiðis at tey virki, sum kunnu vísa á, at hvítvørur, elektronisk tól, bilvrak, bildekk, akkumulatorar, ljósrør og annað serliga dálkandi burturkast, eru viðgjørd og burturbeind á góðkendan hátt, fáa goldið eina ávísa upphædd fyri hvørja staka eind ella vekteind. Soleiðis kunnu eisini handlar og virki, sum selja hesar vørur, bjóða kundum sínum eina betur tænastu, samstundis sum gamla vøran helst eisini fær eina rættari skiljing, viðgerð og burturbeining í framtíðini.

W W W . S O S I A L U R I N . F O